10. desember 2004

## Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 13/2004

Tíð: Hósdagin 9. desember 2004, kl. 13.00-14.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 12/2004 setursráðsfundi 4. november 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við tveimum ískoytismálum.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlóg 2005.** (J.nr. 0015-01365). Deildirnar hava latið setursskrivstovuni endurskoðaði tøl fyri 2005. Endurskoðan av leysalæraratørvinum fyri 2005 vísir, at nýtslan til leysalærarar verður minni enn áður mett. Serliga Náttúruvísindadeildin hevur spart umleið 450.000 kr. við vón um, at møguleiki verður fyri setan av KT-frøðingi í 2005. Í mun til fíggjarlógaruppskotið, sum enn ikki er samtykt, sær út til at til ber at halda fram við ætlaða virkseminum uttan skerjingar. Nakað stórur partur fer til lønir. Býtið verður gjørt so skjótt fíggjarlógin er samtykt.

4. **Valreglur fyri Fróðskaparsetur Føroya.** (J.nr. 0010-00511). Málið hevur verið til viðgerðar á øllum deildum. Fleiri ivamál hava stungið seg upp, m.a. viðvíkjandi orðingunum av starvsbólkunum í valbólki II og um týdningin av orðinum *fast* í valreglunum í mun til starvsskipanarreglurnar og lógina. Samtykt at Eivind Weyhe, Hans Pauli Joensen og Annika Sølvará kanna málið gjøllari og gera eitt nýtt uppskot til deildirnar at taka støðu til.

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Endurskoðan av próvdómarasamsýningum.** (J.nr. 0015-01010). Uppskotini til justeringar eru heldur ójøvn, Annika Sølvará ger eitt yvirlit við uppskoti til ein felags leist, sum verður sent setursráðslimunum, síðani deildunum til hoyringar.

6. **Fundaætlan fyri várhálvu 2005.** (J.nr. 0011-01481). Fundirnir várhálvuna verða: 20. januar, 24. februar, 31. mars, 28. apríl, 26. mai, 30. juni. Fyrsti fundurin í heyst verður 25. august.

7. **Endurnýggjan av setan av adjungerðaum starvsfólki á NVD.** (J.nr. 0022-00788, 0022-00789 og 0022-00790). Fundarskjal: Bræv frá NVD, dagfest 9.12.04, 1 s. Setursráðið tók undir við tilmælinum. Setursskrivstovan avgreiðir málið.

8. **Val av vararektara.** (J.nr. 0011-01379). Hans Pauli Joensen valdur til vararektara fyri tíðarskeiðið 1. desember 2004 til 30. november 2005.

9. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 23.11.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Føroyamálsdeildini 25.11.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Náttúruvisindadeildini 9.12.04.** (J.nr. 0011-00013). Frágreiðingin ikki tøk. HPJ greiddi frá.

**Avgreiðslumál:**

10. **Námsskipan fyri M.A. í mentanarvísindum.** (J.nr. 0042-01380). At staðfesta. Staðfest.

11. **Góðskrivingar. Føroyamálsdeildin mælir til, at Randi Kúrberg fær hesi skeið góðskrivað á M.A.-lestrinum:**
    1. Summarskeið í máli og bókmentum, tikið á Universitetinum í Trómsø, góðskrivað sum 7,5 ECTS.
    2. Nordliks-skeið "Nye studier i Nordisk Poesi", tikið á Syddansk Universitet, góðskrivað sum 10 ECTS. (J.nr. 0046-01504).

    Staðfest.

    **og, at Victoria Absalonsen fær hetta skeið góðskrivað á B. A.-lestrinum:**
    - Nordliks-skeið "Nye studier i Nordisk Poesi", tikið á Syddansk Universitet, góðskrivað sum 10 ECTS. . (J.nr. 0046-01504).

    Staðfest.

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni ultimo oktober 2004, nýtsla fyri alt setrið 13.517.600 kr = 73,6% av játtanarkarmi uppá 18.358.000 kr.** (J.nr. 0015-01111).

13. **Ann-Kristin Olsson Flodin: "Biblioteket som en språkplanerande institution. En studie av språkplanering på färöiska bibliotek", magisteruppsats við Högskolan i Borås, Svøríki. Anki Flodin fekk námsferðarstuðul í ár.** (J.nr. 0071-01126).

14. **Ráðstevna 1.-3.9.05 í Helsinki "Bi- and multilingual universities. Challenges and future prospects", Helsingfors Universitet skipar fyri.** (J.nr. 0057-00155).

Frágreiðing: Annika Sølvará